# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2014

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 4<br>Tíð: 28. apríl 2014, kl. 17.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>28. januar, 17. februar, 17. mars,<br>28. apríl, 26. mai, 23. juni,<br>25. august, 29. september,<br>27. oktober, 24. november,<br>15. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir Býráðslimir uttan Sirið Stenberg</td><td>Ikki á fundi:<br>Sirið Stenberg, fráboðað</td></tr>
</table>

**1) Mál nr.: 14/00034** Eldraøki

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til viðgerðar uppskot til tey 9 punktini sum skulu verða klár í samband við samstarvsavtaluna innan eldraøki í Suðuroynni.
Kommunurnar skulu 1. januar 2015 yvirtaka umsitingina av eldraøkinum, og skulu innan 1. mai 2014 senda uppskot til samstarvsavtalu inn til Almannamálaráðið, sum lýsir hvussu kommununnar í Suðuroynni ynskja at skipa øki (tey 9 punktini).

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til hesi 9 punktini.
Vágs kommuna tekur undir við at taka heimið við Sílánna uppí, tó treyta av at umsitingin verður staðfest í Vágs kommunu.

**2) Mál nr.: 14/00051** Umsókn um uppí bygging til handilsbygning

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn dagfest 20. februar 2014 og tekningar dagfestar 22. januar 2014 frá Sp/f Torgið. Tekniska nevndi hevur viðgjørt umsóknina á fundi í apríl og mælir nevndin býráðnum til at játta umsókníni.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og játta umsókníni um byggiloyvið. Eisini semja um, at leiga honum neyðugi parkeringspláss, umsitingin gerð uppskot til leigusáttmála.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 14/00059** Leigusáttmáli millum Hovla-fish og Vágs kommunu

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til leigusáttmála millum Hovla-fish og Vágs kommunu viðv. matr. nr. 168k (BIP - støðini). Eisini skal takast støða til leigukostnaðin.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við leigusáttmálanum.
Ynskiligt er at leiga verður 2.500,00 kr. um mánaðin. Tað er í tráð við fermetra prísin sum kommunan tekur frá øðrum leigarum.

**4) Mál nr.: 14/00065** Umsókn um byggiloyvi til matr. nr. 290a “Digo”

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn dagfest 26. februar 2014 frá eigarunum av Digo, eigararnir ætla at seta húsini í stand, til útleigan. Tekniska nevnd hevur viðgjørt umsóknina á fundi í apríl og mælir nevndin býráðnum til, at játtað umsóknini treyta av at 3 parkeringspláss verða útvegaði til ognina, í samband við at íbúðir verða bygdar í ovaru hæddini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og játta umsóknini um byggiloyvið.
Umsitingin gerð uppskot til leigusáttmála viðv. parkeringsplássum.

**5) Mál nr.: 14/00093** Tilboð um at keypa ogn matr.nr. 181a og 182

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram fyrispurning um Vágs kommuna er áhuga í at keypa ognirnar matr. nr. 181a og 182 í Vági frá Aslaug Suðuroy, hon ynskir 180.000,00 kr..
Tekniska nevndin og fíggjarnevndin hava viðgjørt málið og mæla tær til, at Vágs kommuna bjóða Aslaug Suðuroy eitt kommunalt grundstykki (uppi í fjallinum) afturfyri ognirnar, og at Vágs kommuna ber kostnaðin av at taka húsini niður og burturbeina tey.

**Avgerð:**
Heri Hjelm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 14/00103** Leigusáttmáli uppá neystagrund matr. nr. 608e

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til broytingar av leigusáttmála uppá neystagrund matr. nr. 608e.
Haakon Leo hevur keypt ognina og skal framhaldandi sjálvur standa fyri leigumálinum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við leigusáttmálanum.

**7) Mál nr.: 14/00079** Streaming av býráðsfundum

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til kunningar skriv dagfest 6. mars 2014 frá Dátueftirlitinum viðvíkjandi streaming av býráðsfundum.

**Avgerð:**
Kunnað.

**8) Mál nr.: 13/00139** Niðurstøða frá Føroya Kærustovni viðv. garagu á matr.nr. 118a

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til kunningar niðurstøðu dagfest 26. mars 2014 frá Føroya Kærustovni. Tekniska nevnd hevur valt ikki at fara víðari við málinum.

**Avgerð:**
Kunnað.
Býráðið tekur undir við Teknisku nevnd um ikki at fara víðari við málinum.

Undirskriva: